KLAKSVÍKAR KOMMUNA
Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Undirskrift formansins:_____

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 28.05.2020 kl. 17:30

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
34/20	14/00665-170	Vegir til eldri sethúsaøkir - Broyting av vegaføring til sambygdu sethúsini oman fyri Stangavegin.
35/20	17/00560-22	Umvæling av vatngoymslu í Strandadali - Støðan
36/20	17/00855-30	Kommunali parturin av bygninginum á Biskupstorgi
37/20	18/01148-15	Avleiðingar av korona og Atlantis (eykajáttan)
38/20	19/00497-24	Umsókn um atløgubryggju við byrgingina um Haraldssund
39/20	19/00514-24	Leigumál uttangarðs
40/20	19/00642-13	Umsókn um at seta úthurð í neyst, matr.nr. 36x, Árnafjørður
41/20	20/00285-10	Møgulig landstøð fyri virksemi í A-72 (Haraldssundi) í Sandvíkum
42/20	20/00338-1	Gøtunavnanevndarinnar tilmæli - uppskot til endurskoðaða mannagongd
43/20	20/00339-1	Ynski um at fáa navnið Skrivaragriftin fram aftur í upprunaøkinum
44/20	20/00446-2	Umsókn um sundurbýti til eigaraíbúðir
45/20	20/00518-1	Tilmæli um broyting í viðtøkunum fyri Klaksvíksgrunnin
46/20	14/00665-156	Vegir til eldri sethúsaøkir - Stangavegur 112
47/20	20/00520-1	Smávegis víðkan av leigulendi hjá Borg (matr.nr. 163a)
48/20	19/00892-55	Fíggjarætlan og roknskapur 2020 - Klaksvíkar Býráð. Tillagingar og endurskoðan av fíggjarætlan 2020

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Til viðgerðar

34/20
14/00665-170 Vegir til eldri sethúsaøkir - Broyting av vegaføring til sambygdu sethúsini oman fyri Stangavegin.

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Ferðslunevndin	18.05.2020	18/20
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	18.05.2020	61/20
3 Tekniska Nevnd	20.05.2020	31/20
4 Fíggjarnevndin	26.05.2020	39/20
5 Klaksvíkar Býráð	28.05.2020	34/20

Frágreiðing um málið:
Nevndirnar hava samtykt niðanfyri standandi raðfesting av vegum til eldri sethúsaøkir, og arbeitt verður aktivt við øki 1 og 2.

Vegir:	***Kostnaður kr.:***	***Viðmerking:***	***Ár:***
1. Omanf. Garðav. (6 – 7 sethús – E. Mikkelsen o.fl.)	*2.500.000*	*Vónandi kann arbeiðið gerast liðugt í ár*	*16-20*
2. Raðhúsini omanfyri Stangavegin	*2.500.000*	*Málið er samtykt.*	*20-21*
3. Omanf. Víkav. (4 sethús – J. Isaksen o.fl.)	*400.000*	*Ongin viðmerking*	*2020?*
4. Omanf. Víkav. (2 sethús – Líggjasarbrekka)	*400.000*	*Ongin viðmerking*	*2020?*
5. Omanf. Víkav. Við Búðaskákið (3 sethús)	*400.000*	*Ongin viðmerking*	*2020?*
6. Stangavegur: Sára Petersen	*500.000*	*Ongin viðmerking*	
Omanf. Stangav. (12 sethús – P. Á Svøð o.fl.)	*3.000.000*	*Sera trupul at fremja*	
Omanf. Stangav. (3 – 4 sethús – P. M. Justesen o.fl.)	*1.000.000*	*Sera trupul at fremja*	
Omanf. Garðav. (3 sethús – K. Jacobsen o.fl.)	*400.000*	*Semja fæst ikki um lendi*	
Omanf. Klaksvíksv. (6 sethús – "N. Á Selheyggi")	*0*	*Ikki gjørligt tekniskt*	
Omanf. Klaksvíksv. (gl. Sethúsini hjá A. Andreasen)	*100.000*	*Krevur eisini tinglesing*	
Omanf. Klaksvíksv. (6 ognir - E. Christiansen o.fl.)	*1.500.000*	*Ongin viðmerking*	
Omanf. Stoksoyrarv. (gl. Sethúsini hjá S. Mikkelsen)	*400.000*	*Gøta frá Stoksoyrarvegi*	
Millum Helnabrekku og Skáltavegin	*1.000.000*	*Ongin viðmerking*	
Síðuvegur Vágsheygsgøta (Sigrun Vágstún)	*100.000*	*Málið er partur av útstykkingaræ. u. Foss.*	
Samanlagt í kr.:	*14.200.000*		

Samráðingar eru við eigara av lendinum í øki 2, sum er vegur til samanbygdu sethúsini omanfyri Stangavegin, og hava hesar samráðingar gingið væl. Kommunan arbeiðir við einari loysn, har málið er ein felags atkoma til økið, sum eisini umfatar matr.nr. 1136 *(sunnan fyri parkeringsplássið)*, sum er ogn hjá Jón Jacobsen. Projektið verður lagað til í løtuni, og tá hetta er góðkent, verður arbeiðið bjóðað út.



Samskifti er eisini við eigaran norðanfyri parkeringsøkið (*matr.nr. 1091*) um keyp av einum hjalli, sum stendur í vegin fyri vegalinjuni.

Tørvur er á, at viðkomandi nevndir og býráð geva umsitingini heimild til neyðugt keyp av lendi til vegin, sum samtyktur er, og til broytingina, sum verður gjørd, nú ætlanin er, at íbindingin skal vera felags, og flutt inn yvir matr.nr. 1136, sum Jón Jacobsen eigur. Málsetningurin er, at øll neyðug keyp verða framd innan fyri vanliga praksis hjá Klaksvíkar kommunu í slíkum førum. Upplýst verður í hesum sambandi, at lendi verður keypt fyri 110,- kr/fermetur, og hjallar eru keyptir fyri á leið 100 tkr.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Málið verður avgreitt innan avseting til *Byggibúning Bústaðir*, har arbeiðið er mett til 2,5 mió. kr.

Tilmæli:
Við hesum verður mælt viðkomandi nevndum og býráði til at taka undir við málinum, sum eisini fer at geva umsitingini heimild til at gera neyðugar avtalur um keyp av lendi og ognum í økinum.

Ferðslunevndin 18. mai 2020:
Nevndin tekur undir við ferðsluliga partinum av málinum.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. mai 2020:
Ein meiriluti, KEZ, SVJ, ÓML og BJ, tekur undir við tilmælinum, dagf. 12-05-2020.
Ein minniluti, GvK, tekur støðu í býráðnum.

Tekniska Nevnd 20. mai 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 12-05-2020.

Fíggjarnevndin 26. mai 2020:
Nevndin tekur undir við TN 20-05-2020.

Klaksvíkar Býráð 28. maj 2020:
Tilmælið frá FíN 26-05-2020 einmælt samtykt.

35/20
17/00560-22 Umvæling av vatngoymslu í Strandadali - Støðan

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska Nevnd	20.05.2020	32/20
2 Fíggjarnevndin	26.05.2020	41/20
3 Klaksvíkar Býráð	28.05.2020	35/20

Frágreiðing um málið:
Samskifti og fundur hevur verið millum SEV og Klaksvíkar kommunu um tøming av byrgingini í Strandadali, sum er rávatnsgoymsla hjá kommununi, tá turkur ella frostbinding ger seg galdandi, sambært sáttmála millum partarnar.

Sum liður í at fáa byrgingina tætta, skal hendan tømast, kanska í einar 2 til 3 vikur, og tí fer kommunan - ta tíðina - onga rávatnsgoymslu at hava. SEV ger vart við, at talan er um trygd, tí vandi er fyri, at partur av byrgingini (*betongkjarnin yvir ánni*) kann fara sambært kanning, sum norskt felag hevur gjørt.

Kommunan hevur fylgt væl við málinum og hevur strongt á at fáa vatnútbyggingina í samband við smoltstøðina á Strond lidna. Nevnda mál fer at viðvirka til, at kommunan fær meira vatn til brúkararnar. Tíanverri eydnaðist ikki at fáa arbeiðið liðugt í 2019. Ein partur av arbeiðinum verður liðugt í juni/juli 2020, og tann seinasti parturin verður ikki liðugur fyrr enn í september 2020.

Umvælingararbeiðið er útsett nakrar ferðir, men á fundi í dag hevur SEV upplýst, at nú kann málið ikki útsetast longur, og tí verður arbeiðið sett í gongd millum 1. og 15. juni 2020.

Málið kemur sera illa við hjá Vatndeildini, vísandi til skylduna hjá kommununi at veita borgarum og virkjum sóttreinsað vatn. Kommunan dugir ikki at síggja í løtuni, at nóg mikið av vatni verður tøkt til borgarar og virkir, meðan umvælingararbeiði hjá SEV verður framt.

Sum eina hjálp er avtalað, at kommunan tekur vatnið í Strandadali uppí kommunalu vatnskipanina saman við øllum vatninum í Svartadali (sum er, tekur SEV størsta partin av vatninum í Svartadali).

Ætlanin hjá kommununi er at bjóða teimum, sum brúka nógv vatn, til ein fund um málið, har endamálið er ein ætlan fyri, hvussu komið verður gjøgnum hesa tíðina við ongari vatngoymslu.

Aðrar upplýsingar:
Kósavirkið er nógv størsti forbrúkari, og brúka teir sera nógv vatn, men virkið leggur virksemið stilt frá ólavsøku og einar 2 til 3 vikur fram.
Vatnnýtslan, meðan Kósavirkið koyrir, liggur um 200 tons um tíman og um náttina 80 tons um tíman, so Kósavirkið brúkar á leið 120 tons um tíman.
Smoltstøðin á Strond hevur sítt egna vatnverk og hevur higartil brúkt gott 310.000 tons rávatn úr Hjarðardali í Kunoy, so teir hava ikki brúkt nógv sóttreinsað vatn frá kommununi.
Kølivatnið til neyðmotorarnar hjá Bakkafrosti kemur frá Klaksvíkar kommunu, men ætlanin er, at teir skulu kølast niður við sjógvi. Rógvi Nielsen, tekniskur verkætlanarleiðari hjá Bakkafrosti, sigur, at hetta arbeiðið verður liðugt um tríggjar vikur.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Lógargrundarlag:
Kunngerð um skyldu til at veita drekkivatn.

Fíggjarligar avleiðingar:
SEV skal rinda allar útreiðslur í samband við umlegging av vatnleiðingum, tá byrgingin verður tømd. Ókent er í løtuni, um málið fær fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa.

Tilmæli:
Við hesum verður málið lagt fyri viðkomandi nevndir og býráð til kunningar, umrøðu og møguliga støðutakan.

Tekniska Nevnd 20. mai 2020:
Nevndin mælir fyrisitingini til at finna eitt annað tíðspunkt fyri umvælingina, ið hóskar vinnuliga virkseminum í kommununi betur.

Fíggjarnevndin 26. mai 2020:
Nevndin tekur undir við TN 20-05-2020.

Klaksvíkar Býráð 28. maj 2020:
Tilmælið frá FíN 26-05-2020 einmælt samtykt.

36/20
17/00855-30 Kommunali parturin av bygninginum á Biskupstorgi

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	26.05.2020	42/20
2 Klaksvíkar Býráð	28.05.2020	36/20

Frágreiðing um málið:
20. apríl 2020 kom niðurstøða loksins frá Kommunala Eftirlitinum, sum í meira enn eitt ár hevur kannað luttøkuna hjá Klaksvíkar kommunu í samband við bygningin á Biskupstorgi.

Eftirlitið gav Klaksvíkar kommunu fult viðhald viðvíkjandi keypinum og ætlaðu nýtsluni av Biskupstorgi. Sostatt ber endiliga til at bjóða ein stóran part av veghæddini út, sum millum annað var endamálið við málinum, ið varð einmælt samtykt av býráðnum 21-06-2018. Við hesum verður tó farið burtur frá leistinum við miðbýarfelag.

Meðan Kommunala Eftirlitið viðgjørdi málið hevur umsitingin fyrireikað útbjóðing av tøku hølunum í mun til galdandi leigumarknaðarprís í miðbýnum, so talan kann gerast um útvent virksemi, eins og býráðið í fleiri umførum hevur samtykt.

Somuleiðis hevur verið arbeitt við at flyta kunningarstovuna til hetta øki í Miðbýnum, sum hóskar seg sera væl til kunningarstovu, tá talan er um hjartað í býnum, har lívið av ferðafólkum kann vera við til at skapa lív og stuðla upp undir virksemið, ið verður í økinum. Samstundis er talan um øki, ið liggur beint við bussteðgiplássið, har nógv ferðandi koma.

Samstarvið hjá kunningarstovuni við Klaksvíkar Handilsfelag kann eisini vera við til at skapa fjølbroytni og lív í økinum. Hartil kemur, at kunningarstovan kann gerast ein sera natúrligur viðleikari í mun til tað útvenda virksemi, sum leigararnir í økinum væntast at ynskja og skapa. Á kunningarstovuni bjóða tey hesari flyting vælkomnari, eins og tey eru greið yvir, at hetta kann broyta arbeiðsdagin og uppgávurnar hjá kunningarstovuni í ein ávísan mun.

Taka viðkomandi nevndir og býráð undir við málinum, so er sannlíkt at avtala er gjørd við leigarar fyri summarfrítíðina, meðan kunningarstovan er flutt inn stutt eftir summarfrítíðina.

Mentanarnevndin varðar av kunningarstovuni, og fíggjarnevndin varðar av útleigu.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Tá lagt verður upp til at leiga út umleið 700 fermetrar fyri marknaðarprís, sum sambært meting frá meklarafyritøku er umleið kr. 1.000 fyri fermeturin árliga, tá ávísar bindingar og treytir sannlíka koma at liggja hjá leigarunum, kann ein árlig inntøka væntast á kr. 700.000 í leigu. Umleið kr. 400.000 eru hartil tøkar til útreiðslur í samband við skipan av býnum.

Hesar inntøkur og avseting tykjast í verandi løtu at rúma tillagingarnar, sum eru neyðugar at gera av hølunum eftir at tey eru boðin fram og í samband við, at kunningarstovan flytir inn.

Hartil kunnu ávísar inntøkur væntast, um hølini, har kunningarstovan heldur til, verða leigað út.

Tilmæli:
Mælt verður til, at viðkomandi nevndir og býráð geva umsitingini heimild at fremja flytingina av kunningarstovuni og at bjóða restina av økinum út til áhugaðar partar, sambært kommunufulltrúini.

Fíggjarnevndin 26. mai 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 12-05-2020.

Klaksvíkar Býráð 28. maj 2020:
Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá Atla S. Justinussen: *Mælt verður til at selja kjallarahæddina í Biskupstorgi við tí treyt, at hæddin verður brúkt til fjølbroytt innihald. Sølan verður lýst alment.* Tað fall við 1 atkvøðu fyri, ASJ, og 10 atkvøðum ímóti, JS, SVJ, TJL, KEZ, ÓML, BK, GvK, BJ, HJS og SOJ.
Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá FíN 26. mai 2020. Tað varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, JS, SVJ, TJL, KEZ, ÓML, BK, GvK, BJ, HJS og SOJ, og 1 atkvøðu ímóti, ASJ.

37/20
18/01148-15 Avleiðingar av korona og Atlantis (eykajáttan)

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	19.05.2020	28/20
2 Fíggjarnevndin	26.05.2020	43/20
3 Klaksvíkar Býráð	28.05.2020	37/20
4 Klaksvíkar Býráð	25.06.2020	

Frágreiðing um málið:
Onki virksemi hevur verið í Atlantis síðan 11. mars 2020.

Beinta Gregersen, leiðari fyri Atlantis, hevur upplýst, at starvsfólkini beinanvegin vórðu send heim, samstundis sum onki hevur verið keypt inn og stovnurin ikki hevur verið kravdur eftir meira filmsleigu, tí ongir filmar hava verið vístir.

Hóast hetta eru fastar útreiðslur, ið skulu rindast, samstundis sum manglandi umsetningurin hevur við sær, at rokningar fyri filmsleigu, sum vanliga hava verið goldnar við næsta filminum, nú liggja og verða ikki goldnar, tí kassin er tómur og væl afturat.

Ávirkanin beint nú er henda:

Ógoldnar rokningar	
Filmsleiga	86.221,10 kr.
Fastar útreiðslur (Olja, el, IRF, internet og líknandi)	71.005,00 kr.
	157.226,10 kr.

Samstundis er greitt, at serstakliga nógvir filmar í framleiðslu eru útsettir, ið fer at hava eitt vakuum við sær gjøgnum árið, tá ongir filmar verða at bjóða fram. Sostatt er støðan hon, at hóast tað skuldi verið soleiðis, at ongar avmarkingar av heilsufakligum ávum verða settar á biograf-virksemi í næstum, so fer Atlantis - ið sum mentanarstovnur í kommununi áhaldandi hevur torført við at fáa virksemið at bera seg - framhaldandi at missa pening gjøgnum alt árið.

Støðan er hon, at Atlantis gjøgnum árið í ár eftir einari leysligari meting fer at missa minst kr. 250.000 beinleiðis orsakað av korona.

Megnar Atlantis ikki at rinda sínar rokningar so hvørt (ið tey ikki gera í løtuni), so verður biografvirksemið øgiliga skjótt niðurlagt, tí rindar ein biografur ikki sína filmsleigu, so eru freistirnar stuttar til veitararnir nokta at leiga filmar út. Eyðvitað er støðan í longdini tann sama við øðrum rokningum.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Um málið verður framt, so verður talan um eykajáttan á kr. 250.000 ella aðra upphædd av tøkum peningi.

Tilmæli:
Mælt verður til, at avvarðandi nevndir og býráð taka støðu til, um stuðulin hjá Atlantis, orsakað av avleiðingunum av korona, skal økjast við kr. 250.000 ella møguligari aðrari upphædd, so biograf-virksemið í býnum hórar undan í hesi serligu støðu.

Mentanarnevndin 19. mai 2020:
Nevndin beinir málið í FíN.

Fíggjarnevndin 26. mai 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 13-05-2020.

Klaksvíkar Býráð 28. maj 2020:
Tilmælið frá FíN 26-05-2020 einmælt samtykt við fyrru viðgerð.

38/20
19/00497-24 Umsókn um atløgubryggju við byrgingina um Haraldssund

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	18.05.2020	63/20
2 Havna- og Vinnunevndin	18.05.2020	19/20
3 Klaksvíkar Býráð	28.05.2020	38/20

Frágreiðing um málið:
8. apríl 2019 søkti Bakkafrost um at gera tveir pierar norðanfyri byrgingina í Haraldssundi og nakað líknandi sunnanfyri byrgingina fyri at kunna leggja brunnbátar at og soleiðis føra smolt og frá smoltstøðini á Strond umborð á hesar.

11. apríl 2019 sendi Bakkafrost kommununi nýggja umsókn, har søkt varð um at leggja eina flótibrúgv sunnanfyri byrgingina sum eina royndarverkætlan, heldur enn at gera pier.

Málið um pierar varð viðgjørt í apríl-umfarinum 2019, og hevði tekniska fyrisiting millum annað hesar fyrisitingarligu viðmerkingar:

Tá Bakkafrost í 2015 kunnaði kommununa um ynski um eina smoltstøð á Strond, kunnaðu teir eisini um nevndu grótkast, men kommunan hevur ikki hoyrt meira um málið, hóast spurt hevur verið um hetta á fundum. Kommunan hevur av somu orsøk ikki gjørt meira við hendan partin av málinum.

Viðv. byggisamtyktini fyri økini:
Ætlaða grótfyllingin norðanfyri byrgingina liggur í sjóøki út fyri økispart B19 og krevur tí byggisamtyktarbroyting. Ætlaða grótfyllingin sunnanfyri byrgingina sær í fyrstu atløgu út til at rúmast innanfyri økispart B18 – hetta verður tó at kanna nærri.

Tekniska Fyrisiting mælir til, at umsøkjarin greinar nærri ætlaða tørvin, og at fyrisitingin – út frá hesum - fær heimild til at fara undir tilgongdina við neyðugari byggisamtyktarbroyting norðanfyri og sunnanfyri byrgingina.

Viðv. loyvinum annars mælir TF til hesar treytir:

- At Bakkafrost sendir kommununi fullfíggjað projekt, sum lýsir verkætlanina væl og virðiliga.
- At allar forskriftir viðvíkjandi vegum, bryggjum, vatn-, kloakk- ella øðrum tekniskum leiðingum skulu haldast.
- At hugsað er um almennan tryggleika, skil, heilsu og onnur viðurskifti sum tílíkt byggi-/annlegsarbeiði krevur, og sum er eitt krav í byggisamtyktini fyri Klaksvíkar kommunu.
- At Klaksvíkar Havn verður hoyrd um málið.
- At øll leigu- og ognarviðurskifti eru í lagi, og verða reguleraði í samband við verkætlanina, um neyðugt.
- At byggiarbeiðið ikki kann byrja, fyrr enn kommunan hevur givið skrivligt loyvi til ætlanina.

Allar viðkomandi nevndir og býráð tóku einmælt undir við tilmælinum frá umsitingini, at taka undir við ætlanini hjá Bakkafrost, sambært viðmerkingum og treytum frá Teknisku Fyrisiting og Vinnudeildini.

23. mai 2019 sendi kommunan Bakkafrosti skriv, har kunnað verður um hesa samtykt og tær treytir, sum eru lýstar omanfyri, og viðvíkjandi royndarverkætlanini við flótibrúgvum varð lagt afturat, at Klaksvíkar kommuna fer at kunna aðrar myndugleikar um ætlanina hjá Bakkafrost á Strond. Tí verður heitt á Bakkafrost um at lata kommununi neyðugt tilfar, tekningar og frágreiðingar, sum neyvt lýsa ætlanina, at nýta í hesum sambandi.

Bakkafrost hevur ikki vent aftur viðvíkjandi einari ætlan um pierar, men hevur gjørt ávísar royndir við flótibrúgvum, sum kommunan í ávísan mun hevur verið kunnað um, tó uttan at aðrar tekningar ella frágreiðingar hava verið veittar.

2. apríl 2020 vendir Bakkafrost sær aftur til kommuna við ynski um at leggja atløgubrúgvar báðum megin byrgingina í Haraldssundi, og 16. apríl eru umboð fyri Bakkafrost á fundi hjá kommununi. 20. apríl 2020 sendir Bakkafrost umsókn um at leggja flótirammu sunnan fyri byrgingina líknandi henni norðan fyri byrgingina saman við tekningum av, hvussu hesar báðar eru hugsaðar at verða lagdar. Orsakað av hesum verður gingið út frá, at talan er um eina samlaða umsókn fyri báðar flótirammurnar.





Á fundinum 16. apríl greiða umboðini frá Bakkafrosti frá, at ætlanin er at snøgga um rammurnar, tó at hetta ikki er lýst nærri í skrivliga tilfarinum. Tað hevur verið nevnt, at flótiramman norðanfyri ikki tekur seg væl út í landslagnum, nú sjálv smoltstøðin veruliga er farin at taka seg væl út.

Tekniska fyrisiting hevur upplýst, at so leingi installatiónin liggur fyri akker og ikki er samanbygd við land, so fevnir bygnignskunngerðin ikki um eina slíka installatión. Hartil er greitt, at vanligt er, at flótibrúgvar liggja í økjum uttan fyri byggisamtykt.

Sera sannlíkt er ikki talan um bestu varandi loysnina fyri økið, men tað hevur somuleiðis týdning, at Bakkafrost fær framt sítt virksemi. Ein møguleiki kundi verið, at viðmælt Bakkafrosti at greina varandi loysnina nærri, so til bar at tillaga byggisamtykt og onnur formell viðurskifti samsvarandi einari slíkari ætlan, samstundis sum eitt áramálsavmarkað loyvi til nevndu rammur verður givið.

<u>Lógargrundarlag:</u>

<u>Fíggjarligar avleiðingar:</u>
Ongar

<u>Tilmæli:</u>
Mælt verður til, at viðkomandi nevndir og býráð taka undir við hesari ætlan hjá Bakkafrosti, tó í fyrsta umfari avmarkað til 3 ár.

<u>Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. mai 2020:</u>
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 11-05-2020.

Havna- og Vinnunevndin 18. maj 2020:

Nevndin tekur undir við tilmælinum dagfest 11-05-2020.

Klaksvíkar Býráð 28. maj 2020:
Tilmælini frá UBN og HaVN 18-05-2020 einmælt samtykt.

39/20
19/00514-24 Leigumál uttangarðs

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	18.05.2020	K-24/20
2 Tekniska Nevnd	20.05.2020	35/20
3 Fíggjarnevndin	26.05.2020	44/20
4 Klaksvíkar Býráð	28.05.2020	39/20

Frágreiðing um málið:
Vísandi til TF-tilmæli frá 10-01-2020 og eftirfylgjandi nevndarsamtyktir verður málið um leiguprís fyri lendi uttangarðs við hesum lagt fyri nevndirnar aftur.

Útgingnir leigutakstir: kr. 1,-/m^2.

Eftirsum talan partvís er um landsjørð, hevur Tekniska Fyrisiting hugt eftir prísunum hjá Búnaðarstovuni, og við útgangsstøði í hesum verður skotið upp soljóðandi:

> *Leigutakstir pr. hagapart fyri lendi upp til 1000 m^2:*
> *kr. 3,68/m^2 – tó ikki minni enn kr. 3000,- pr. ár.*
> *Leiguskeið 5 ár ella eftir nærri avtalu*
>
> *Leigutakstir pr. hagapart fyri lendi meir enn 1000 m^2:*
> *kr. 3,68 pr. m^2 – tó ikki minni enn kr. 5.700,- pr. ár*
> *Leiguskeið 10 ár ella eftir nærri avtalu*
>
> GG: Uppskotið leggur upp til vídd pr. hagapart – ikki hvørt einstakt øki.

Avleiðingar í mun til verandi leigumál:

Leiga av lendi í Svartadali - undir arbeiðsskúri hjá Vatndeildini: (Ognarhagi)
Útgingið leigugjald: kr. 800,- pr. ár
Endurskoðaður leiguprísur sambært uppskot: kr. 3000,- (eigararnir seta fram ynski um kr. 5.000,-)

Lendi á Fossum – undir vatnbrunnunum hjá Vatndeildini: (Ognar- og landsjørð)
Útgingið leigumál: kr. 5.000,- pr. ár
Endurskoðaður leiguprísur sambært uppskot: kr. 11.783,- pr. ár (eigararnir góðtaka)

Lendi í Ánagjógv – undir vatnbrunnunum hjá Vatndeildini: (landsjørð)
Verandi leigumál, sum gongur út 31. des. 2023: kr. 8.119,-
Endurskoðaður prísur eftir 31. des. 2023: kr. 29.878,- (prísur Búnaðarstovunnar)

Lógargrundarlag:

Fíggjarligar avleiðingar:
Meirkostnaður uppá uml. kr. 10.000,- pr. ár at fíggja av *Vatndeildini - rakstur*

Tilmæli:
Omanfyri nevnda uppskot til endurskoðaðar leiguprísir verður við hesum lagt fyri avvarðandi nevndir og býráð til viðgerðar.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. mai 2020:
Málið verið til kunningar.

Tekniska Nevnd 20. mai 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 12-05-2020.

Fíggjarnevndin 26. mai 2020:
Nevndin tekur undir við TN 20-05-2020.

Klaksvíkar Býráð 28. maj 2020:
Tilmælið frá FíN 26-05-2020 einmælt samtykt.

40/20
19/00642-13 Umsókn um at seta úthurð í neyst, matr.nr. 36x, Árnafjørður

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	18.05.2020	59/20
2 Klaksvíkar Býráð	28.05.2020	40/20

Frágreiðing um málið:
Umsóknin frá neystaeigarum í Árnafirði, har nakrir søkja um loyvi at hava atkomu til neystini fram við síðunum, hevur nú verið til hoyring hjá øllum neystaeigarum, eftir samtyktini í býráðnum tann 26. september 2019.

Klaksvíkar Býráð 26. september 2019:
Atkvøtt varð um tilmælið frá ÁrN 18. sept.; tað fall við 5 atkvøðum fyri (GvK, ASJ, BJ, HJS og SOJ) og 6 atkvøðum ímóti (JS, SVJ, TJL, KEZ, KáG og BK). Síðani varð atkvøtt um at beina málið aftur í umsitingina at skipa fyri formligari grannahoyring, áðrenn málið fer víðari í UBN; tað varð samtykt við 5 atkvøðum fyri (JS, TJL, KEZ, KáG og BK), 2 atkvøðum ímóti (ASJ og SOJ) og 4 blokum atkvøðum (SVJ, GvK, BJ og HJS).

Lógargrundarlag:

Fíggjarligar avleiðingar:

Tilmæli:
Ongin hevur mótmælt ætlanini.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. mai 2020:
Ein meiriluti, KEZ, ÓML, GvK og BJ, tekur undir við ÁrN 18-09-2019.
Ein minniluti, SVJ, mælir til at halda fast við upprunaætlanina/tekningarnar.

Klaksvíkar Býráð 28. maj 2020:
Atkvøtt varð um tilmælið frá ÁrN 18. sept. 2019; tað varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, JS, KEZ, ÓML BK, GvK, ASJ, BJ, HJS og SOJ, og 2 atkvøðum ímóti, SVJ og TJL.

41/20
20/00285-10 Møgulig landstøð fyri virksemi í A-72 (Haraldssundi) í Sandvíkum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	18.05.2020	64/20
2 Havna- og Vinnunevndin	18.05.2020	20/20
3 Tekniska Nevnd	20.05.2020	33/20
4 Fíggjarnevndin	26.05.2020	46/20
5 Klaksvíkar Býráð	28.05.2020	41/20

Frágreiðing um málið:
Bakkafrost hevur í mong ár havt landstøð í Haraldssundi til virksemið, sum er norðan fyri byrgingina. Bakkafrost hevur í skrivi dagfest 7. februar sent kommununi hjálagda upplegg viðvíkjandi nýggjari landstøð í Sandvíkum niðanfyri Svartadal.

Í upplegginum verður gjørt greitt, at "vegna Bakkafrost Farming, verður hervið heitt á Klaksvíkar kommunu, um at gera veg út til- og lending úti í Svartadali."

Síðan hetta upplegg varð sent kommununi hava fundir verið við Bakkafrost í tveimum umførum viðvíkjandi hesari ætlan. Kommunan hevur hartil kunnað Bakkafrost skrivliga um, at hetta mál verður viðgjørt av avvaraðndi nevndum og býráð hetta umfarið, og at kommunan er positiv um ætlanina.

Tekniska fyrisiting er farin undir at fyrireika eina møguliga byggisamtyktar-broyting, sum eisini verður neyðug, um henda verkætlan skal fremjast.

Tekniska fyrisiting hevur gjørt eina kostnaðarmeting um kommunan skal fremja bæði veg, lendi og havn til hetta virksemi:

1. Kostnaður av vegi:

Vegurin: uml. 600 metrar x 5 metrar fyri kr. 7.000,- pr. metur (vegagerð)	kr. 4.200.000,-
Keyp av lendi: 600 metrar x 5 metrar x ca. *110,- kr pr. fermetur	- 330.000,-
Samlaður kostnaður	kr. 4.530.000,-

**Sambært Búnaðarstovuni verður kostnaðurin fyri lendi settur til uml. 60 kr/fermetur, men aðrar samráðingar við hagastýrið geva kommununi ábending um, at helst verður ikki selt fyri minni enn 110,- kr./fermetur.*

2. Kostnaður av øki:

Øki: 30 x 50 metrar í vídd (byggibúning)	kr. 2.000.000,-
Keyp av lendi: 1500 fermetrar x 110,- kr. pr fermetur	- 165.000,-
Samlaður kostnaður:	kr. 2.165.000,-

3. og 4. Kostnaður av kai og pieri er mettur til einar 10 til 15 mió. kr.

5. Kostnaður av húsi er mettur til einar 5 mió. kr.

Samlað verkætlan (1 til 5) er mett til einar 22 til 27 mió. kr.

Um samanborið verður við aðrar líknandi verkætlanir, so sum smoltstøðina á Strond og komandi landstøðina við Grótrætt, so hevur kommunan í grundini gjørt lendið klárt, meðan Bakkafrost síðan hevur gjørt tær installatiónir, sum eru neyðugar til teirra virksemi. Í teimum báðum førunum hevur Bakkafrost keypt undirlendið, sum felagið virkar á, men tað eru eisini dømir, har Bakkafrost virkar á leigulendi hjá kommununi.

Skuldi tað verið soleiðis, at henda verkætlan ber á mál, so kann tað avgjørt hava eitt virði fyri framtíðina, at kommunan, sum hevur so lítið byggilendi eisini hyggur at økinum ímillum landstøðuna og verandi smoltstøð á Strond.

Lógargrundarlag:

Fíggjarligar avleiðingar:
Fíggjarligu avleiðingarnar valdast hvørja loysn lendiseigarar og kommunan, umframt Bakkafrost og kommunan koma fram til. Nóg stór peningaupphædd er í løtuni ikki sett av til hvørki vegagerð, fyrireiking av øki og heldur ikki til havnagerð. Sannlíkt er tó rúm fyri einum lendiskeypi innanfyri verandi avsetingar.

Ber hetta á mál, samstundis sum Bakkafrost framhaldandi býtur sín partafelagsskatt samsvarandi virksemi, og úrslitini halda á at vera góð, so kann talan gerast um eina inntøku. Verður økið skipað sum leigulendi, so hevur ein slík loysn eisini nakað av inntøku við sær.

Tilmæli:
Mælt verður til, at umsitingin fær heimild til at taka upp samráðingar við lendiseigararnar við tí hyggju at keypa neyðuga lendið til veg og landstøð við einum fermetraprísi samsvarandi tí, sum slíkt lendi vanliga verður keypt fyri í kommununi. Mælt verður somuleiðis til, at aðrir kostnaðir í samband við hesa verkætlan, verða tiknir upp í samband við fíggjarætlanina 2021.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. mai 2020:
Nevndin tekur undir við byggisamtyktarliga partinum av málinum.

Havna- og Vinnunevndin 18. mai 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagfest 13-05-2020.

Tekniska Nevnd 20. mai 2020:
Nevndin tekur undir við HaVN 18. mai 2020.

Fíggjarnevndin 26. mai 2020:
Nevndin tekur undir við TN 20-05-2020.

Klaksvíkar Býráð 28. maj 2020:
Tilmælið frá FíN 26-05-2020 einmælt samtykt.

42/20
20/00338-1 Gøtunavnanevndarinnar tilmæli - uppskot til endurskoðaða mannagongd

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	19.05.2020	30/20
2 Fíggjarnevndin	26.05.2020	47/20
3 Klaksvíkar Býráð	28.05.2020	42/20

Frágreiðing um málið:
Gøtunavnavnanevndin hevur frá fundi 3. mars 2020 soljóðandi tilmæli:

> *Nevndin mælir til, at tilmæli frá Gøtunavnanevndini bert verða latin víðari til býráðið til viðgerðar við einmæltum tilmæli/undirtøku frá Mentanarnevndini. Um semja ikki er í Mentanarnevndini, verður málið at lata Gøtunavnanevndini aftur við viðmerkingum, so nevndin kann arbeiða víðari við uppskotinum/uppskotum. Nevndin er somuleiðis til reiðar at koma á tal við Mentanarnevndina.*

Lógargrundarlag:
Kommunustýrisskipanin

Fíggjarligar avleiðingar:
-

Tilmæli:
Talan er um broyting í mannagongd í mun til tilmæli millum nevndir og býráð, og verður málið tí latið avvarðandi nevndum og býráði til støðutakan.

Mentanarnevndin 19. mai 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum 09-03-2020.

Fíggjarnevndin 26. mai 2020:
Nevndin tekur undir við MeN 19-05-2020.

Klaksvíkar Býráð 28. maj 2020:
Tilmælið frá FíN 26-05-2020 einmælt samtykt.

43/20
20/00339-1 Ynski um at fáa navnið Skrivaragriftin fram aftur í upprunaøkinum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.

1 Mentanarnevndin	19.05.2020	31/20
2 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	19.05.2020	K-3/20
3 Tekniska Nevnd	20.05.2020	K-21/20
4 Klaksvíkar Býráð	28.05.2020	43/20

Frágreiðing um málið:
Gøtunavnanevndin hevur frá fundi 3. mars 2020 soljóðandi tilmæli til avvarðandi nevnd og býráð:

Tilmæli:

Út frá tí staðfesting, at Skúlavegur nú er avbrotin við nýggjum skúlabygningi, liggur vegurin nú í tveimum pørtum. Sunnari partur av Skúlavegi má sostatt fáa annað navn, ella verður hann partur av Gerðagøtu.
Nevndin ynskir staðiliga at fáa navnið *Skrivaragriftin* fram aftur í økinum, har tað hoyrir heima, og mælir tí til, at íbindingin í Gerðagøtu við hartilhoyrandi øki, verður kallað *Skrivaragriftin*.
Ongar privatar adressur verða ávirkaðar av broytingini, - bert kommunalir stovnar/skúli (Snjalla Bjalla og Gregoriussen-bygningurin, sum hýsir m.a. skúlatannlækna og fimleikarhallum) (sí kort á skjali I)

Lógargrundarlag:
Kommunustýrisskipanin
Løgtinglóg nr. 17 frá 6. mars 2002 um adressur. §3, stk. 1

Fíggjarligar avleiðingar:
-

Mentanarnevndin 19. mai 2020:
Ein meiriluti, SVJ, ÓML, GVK og BK, tekur undir við tilmælinum dagfest 10-03-2020.
Ein minniluti, ASJ, tekur støðu í býráðnum.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 19. mai 2020:
Málið verið til kunning.

Tekniska Nevnd 20. mai 2020:
Málið verið til kunningar.

Klaksvíkar Býráð 28. maj 2020:
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í MeN 19. mai 2020; tað varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, JS, SVJ, TJL, ÓML, BK, GvK, BJ, HJS og SOJ, og 1 atkvøðu ímóti, ASJ, og 1 blankari atkvøðu, KEZ.

44/20
20/00446-2 Umsókn um sundurbýti til eigaraíbúðir

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Norðoyrarnevndin	06.05.2020	6/20
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	18.05.2020	55/20
3 Klaksvíkar Býráð	28.05.2020	44/20

Frágreiðing um málið:
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til, at Sp/f Norðhús fær loyvi til at sundurbýta matr.nr. 25v á Norðoyri í 6 íbúðir afturat, sum upprunaliga ætlanin var í 2010, og sum fyritøkan tá eisini, sambært viðheftum skjølum, fekk byggiloyvi til.
Matr.nr. 25v er 1700 m^2 til víddar og svarandi til grundøkjavídd pr. íbúð: 142 $m^{2.}$ (tilsamans 12 íbúðir)
Nýliga samtykta byggisamtyktarbroytingin leggur upp til minsta mark grundøkjavídd til íbúðir at vera 150 m^2 pr. íbúð.



Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert tilmælandi partur

Tilmæli:
Vísandi til, at talan er um framhald av verkætlan við byggiloyvi frá 2010, mælir Tekniska Fyrisiting til at viðmæla sundurbýti sambært umsókn.
ES: Verður trupuleiki við at fáa sundurbýtið góðkent orsakað av manglandi víddini uppá 100m^2 er møguleiki fyri at lata Sp/f Norðhús yvirtaka kommunala geiran eystanfyri til samanleggingar við matr.nr. 25v, sum heimild er givin til í býráðssamtykt frá 06-02-2020 (máli 20/00048-9), - møguliga við servitutti um at liggja opin sum almenn gonguleið.

Norðoyrarnevndin 6. mai 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini 28-04-2020.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. mai 2020:
Nevndin tekur undir við Norðoyrarnevndini 6. mai 2020.

Klaksvíkar Býráð 28. maj 2020:
Tilmælið frá UBN 18-05-2020 einmælt samtykt.

45/20
20/00518-1 Tilmæli um broyting í viðtøkunum fyri Klaksvíksgrunnin

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	26.05.2020	49/20
2 Klaksvíkar Býráð	28.05.2020	45/20

Frágreiðing um málið:
Nevndin fyri klaksvíksgrunnin hevur samtykt at broyta § 3 í viðtøkunum fyri grunnin.

Grein 3: ”*Fyri virksemi grunnsins heftir bert tann eginogn grunnurin til einhvørja tíð eigur (stovnsfæ grunnsins er kr. 500.000.)”*

Broytingin gevur nevndini fyri grunnin heimild til at ráða yvir stovnsfænum, sum er kr. 500.000,-.

Peningurin er upprunaliga komin frá lokala sjónvarpsfelagnum sum bleiv avtikið, tá landsumfatandi KVF bleiv stovnað. Avgjørt var at seta ognirnar hjá felagnum í grunn, sum fekk navnið klaksvíksgrunnurin.

Sum er, fara pengar úr grunninum, men ongir pengar koma inn, hóast áheitanir um stuðul eru sendar vinnulívinum, bankum, tryggingarfeløgum og almennum myndugleikum. Tí eru ongir pengar at luta út. Stovnsfæið stendur eftir og pengarnir verða ikki brúktir til tað, sum teir upprunaliga vóru játtaðir til, nevniliga vælgerandi tiltøkum, Klaksvíkini og norðoyggjum at frama.

Orsøkin til ásetingina í § 3 var, at táverandi rentustøðið var so høgt, at mett var, at nokk av peningi var at luta útav av teimum afturatkomnu rentunum. í dag kostar tað grunninum at hava pening innistandandi.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Mælt verður til at samtykkja uppskotnu viðtøkubroytingina. Nevnast kann, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur góðtikið broytingina í viðtøkunum.

Fíggjarnevndin 26. mai 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 13-05-2020.

Klaksvíkar Býráð 28. maj 2020:
Tilmælið frá FíN 26-05-2020 einmælt samtykt.

46/20
14/00665-156 Vegir til eldri sethúsaøkir - Stangavegur 112

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	20.04.2020	33/20
2 Tekniska Nevnd	22.04.2020	23/20
3 Fíggjarnevndin	28.04.2020	28/20
4 Klaksvíkar Býráð	30.04.2020	27/20
5 Klaksvíkar Býráð	28.05.2020	46/20

Frágreiðing um málið:

UBN, TN og Býráðið hava raðfest fyrstu fýra økini í Klaksvík, sum ikki hava koyriveg til húsini. Í januar 2019 hava nevndirnar og býráðið viðgjørt eitt uppskot um parkeringspláss og veg til raðhúsini omanfyri Stangavegin, og samtykt er, at málið skal fremjast í ár. Talan er sostatt um 5 raðfest økir.

Sethúsaeigara í økjum við ongum vegi spyrja javnan eftir málinum, oftast munnliga, men eisini skrivliga. Seinasta skrivliga umsóknin er komin frá borgara á Stangavegi:

Sí viðhefta umsókn og fyrsta svarskriv til borgaran. Umsitingin hevur mett ein møguligan vegastubba til at kosta einar 500 tkr. Málið er torført at loysa, og serligar avbjóðingar eru við Kósabrekkuni, sum er brøtt, smøl og útsýnið er vánaligt. Kósabrekkan krevur eisini ábøtur. Stórur møguleiki er fyri, at kostnaðurin av samlaða arbeiðinum gerst størri enn 500 tkr.

Sum áður upplýst, hevur kommunan eisini fingið fyrispurningar frá sethúsaeigarum um lendiskeyp í øki nr. 4 og 5, frá tveimum ella trimum sum skulu lata lendi til vegin. Eigarar, sum liggja við Víkavegin, eru áhugaðir í at fáa málið um lendið upp á pláss, innan ov long tíð gongur. Viðkomandi hava sjálvi veg til sethús síni, men skulu lata lendi, so onnur fáa veg.

Sambært samtykt í januar 2019 skal Tekniska Fyrisiting fara í samráðingar við lendiseigara í øki nr. 2, 3, 4 og 5.

Víst verður til dagført yvirlit, har raðfestir vegir – og vegir sum ikki eru raðfestir – eru settir upp.

<u>Lógargrundarlag:</u>
Ongin viðmerking

<u>Fíggjarligar avleiðingar:</u>
Talan verður um eykajáttan, tí peningur er ikki raðfestur til pkt. 4 og 5

<u>Tilmæli:</u>

Við hesum verður málið lagt fyri viðkomandi nevndir til viðgerðar/støðutakan.

Tekniska Fyrisiting hevur hesa viðmerking til málið: Samtykta raðfestingin 1 til 5 í talvu kostar um einar 5 mió. kr. - Tá er roknað við, at liðugtgerð av Garðsgøtu kostar uml. eina mió. kr.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. apríl 2020:
Nevndin tekur undir við at raðfesta vegin til Sáru Petersen sum nr. 6 á listanum, men liðugtger pkt. 1-3, áðrenn farið verður víðari við øðrum økjum.

Tekniska Nevnd 22. apríl 2020:
Nevndin tekur undir við UBN 20-04-2020, og at tað framhaldandi verður arbeitt við lendiskeypi til pkt. 4 og 5 (Búðaskákið og Líggjasarbrekka).

Fíggjarnevndin 28. apríl 2020:
Nevndin tekur undir við TN 22-04-2020.

Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2020:
Tilmælið frá FíN 28-04-2020 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 28. maj 2020:
Tilmælið frá BýR 30-04-2020 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

47/20
20/00520-1 Smávegis víðkan av leigulendi hjá Borg (matr.nr. 163a)

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Ferðslunevndin	18.05.2020	22/20
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	18.05.2020	K-26/20
3 Havna- og Vinnunevndin	18.05.2020	22/20
4 Fíggjarnevndin	26.05.2020	50/20
5 Klaksvíkar Býráð	28.05.2020	47/20

Frágreiðing um málið:
Borg hevur 12. mai 2020 sent soljóðandi umsókn til kommununa:

Vit vilja við hesum søkja um loyvi at seta upp eina reol fram við bygninginum hjá Borg í Klaksvík.
Eisini er ynski at hava tvey pláss til leigu at seta bingjur á, tá vøra kemur hvørja viku.

Hjálagt eru tekningar av reolum.

Vónandi verður henda umsókn viðgjørd við vælvild og hoyra vit skjótt aftur frá tykkum.

GREIN RÆOL 1,70M x 50M HÆDD 4,5 - 5M



Umboð fyri Borg hava upplýst formanninum í Havna- og vinnunevndini, at hetta fer at hava við sær, at tilfar, sum rúm ofta ikki er fyri inni á goymsluni, og tí ofta liggur ymsastaðni á havnalagnum, verður savnað skipað og savnað í eitt stað, ið er fram við vegginum.

Verður umsóknin gingin á møti hevur tað við sær, at Borg kemur at leiga ein geira fram við bygninginum á umleið 100 fermetrar afturat frá kommununi, har tað longu í dag ofta liggur tilfar. Hartil kemur at økið kann verða betri skipað. Hinvegin merkir hetta eisini, at havnaøkið út frá bygninginum verður avtalað at vera einar tveir metrar smalri enn tað longu er. Samlað sað verður mett, at tað er gagnligt fyri økið, um hetta merkir, at tilfarið verður skipað og savnað á einum stað.

Hartil kemur ynskið um eitt øki at seta tvær bingjur á nærhindis verandi virksemi. Fyrisitingin hevur ikki síðan umsóknin kom inn havt møguleika til at kanna út í æsir, hvørjir møguleikar eru til tað. Tó er greitt, at Magn hevur eitt lutfalsliga stórt leigulendi nakað longri heimi, har hetta kundi verið ein møguleiki. Tá er tað sostatt ikki kommunan, sum kann geva loyvi.

Lógargrundarlag:

Fíggjarligar avleiðingar:
Við verandi prísum er kostnaðurin fyri fermeturin um árið av asfalt/betong-lendi kr. 41. Sostatt verður talan um eina avmarkaða inntøku til Klaksvíkar havn á undir kr. 5.000 um árið.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndirnar taka undir við, at økið á verður meira skipað og umsitingin fær heimild at tillaga leigusáttmálan hjá Borg, so hesin geiri verður lagdur afturat.

13-05-2020
Eirikur í Jákupsstovu
Vinnu- og mentanarstjóri

Ferðslunevndin 18. mai 2020:
Nevndin mælir til, at málið verður betur lýst – m.a. við at løgreglan saman við teknisku fyrisiting fer á staðið at kanna ferðsluviðurskiftini – og ger eina lýsing at leggja fyri FeN aftur.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. mai 2020:
Málið verið til kunningar.

Havna- og Vinnunevndin 18. mai 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagfest 13-05-2020 og mælir FeN til at koma við eini niðurstøðu áðrenn býráðsfundin.

Fíggjarnevndin 26. mai 2020:
Ein meiriluti, JS, SVJ og TJL, tekur undir við HaVN 18-05-2020.
GvK og HJS taka støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 28. maj 2020:
Einmælt samtykt at taka undir við HaVN 18. mai 2020 og meirilutanum í FíN 26. mai 2020 tó við teirri treyt, at talan verður um eitt royndartíðarskeið í 3 ár.

48/20
19/00892-55 Fíggjarætlan og roknskapur 2020 - Klaksvíkar Býráð. Tillagingar og endurskoðan av fíggjarætlan 2020

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	26.05.2020	38/20
2 Klaksvíkar Býráð	28.05.2020	48/20

Frágreiðing um málið:

Vanliga leggur fíggjarnevndin eina endurskoðaða fíggjarætlan tíðliga í árinum, sum tekur útgangsstøði í óbrúktum játtanum frá árinum fyri.

Tó hevur hetta árið verið alt annað enn vanligt, tí um miðjan mars, rakti Korona smittan okkum, og hevði hetta við sær, at leiðslan valdi at bíða við málinum, fyri at síggja hvussu inntøkurnar háttaðu sær í tíðarskeiðinum undir og eftir Korona.

Fólk vórðu send heim 13. mars. Hóast tað var møguligt hjá fleiri starvsfólkum hjá kommununi at arbeiða heimanífrá, so lat tað seg ikki gera á øllum deildum.

Hetta bar við sær, at fleiri mál dragnaðu nakað, og fleiri arbeiðir, ið annars vóru ætlaði í tíðarskeiðinum, høvdu ikki tað framdryftina, sum varð ætlað.

Harafturat, sóðu vit eisini, at skattainntøkurnar fyri apríl, høvdu bara ein vøkstur upp á 1%, sum er eitt sindur undir tað, sum býráðið hevur gjørt fíggjarætlan eftir. Í fíggjarætlanini vórðu inntøkurnar fyri inniverandi ár mettar til 2,2% hægri enn inntøkurnar í 2019, og svarar tað til eina samlaða meirinntøku upp á í alt 6,3 mió. kr. Tó kunnu vit fegnast um, at vit higartil í ár, hava fingið stórt sæð allan tann vøksturin í kommunukassan, nevniliga knapt 5,9 mió. longu nú.

Tó krevur tíðin, at vit eru varin, hóast vit á allan hátt halda framdryftini uppi og virkseminum í gongd, so vinnulívið framhaldandi hevur nokk at takast við í kommununi.

Fíggjarlig tilbúgvingarætlan
Kommunan er væl fyri at standa ímóti einari slíkari kreppu, tí seinastu árini eru stórt sæð allar íløgur gjørdar uttan lántøku. Orsøkin til at hetta hevur verið møguligt er, at býráðið legði peningin til síðis til fleiri av stóru verkætlanunum, har fyrsta byggistig av skúlanum uttan iva var tann stórsta.

Í løtuni eru vit góðar 120 mió. undir einari álíkning, og gevur hetta okkum stabilar møguleikar fyri at handfara eina møguliga kreppu, um so skuldi verið at inntøkurnar næstu mánaðirnar lækka nógv. Borgarstjórin hevur upplýst, at viljin er at halda virkseminum í gongd, so vinnulívið ikki missur framdryftina, og tað er við tí í huga, at tillagingarnar nú verða lagdar fyri.

Seinastu árini hava stórar upphæddir staðið óbrúktar tá ið árið er enda, og tí hevur býráðið valt at framflyta. Hetta hevur verið gott fyri fleksibilitetin, men nú tíðirnar alt annað líka eru broyttar, verður mett neyðugt at býráðið endurskoðar fíggjarætlanin, við tí fyri eyga at hon betri endurspeglar virksemið, sum kommunan megnar at avgreiða í inniverandi ári.

Við hesum uppskotinum til endurskoðan av fíggjarætlanini, fer kommunan at hava ein íløgukarm á 112 mió. kr. í ár, og verður tað mett møguligt at seta virksemi eftir tí.

Vakstrarfremjandi íløgur
Í samband við framflytingarnar í 2019 varð avgjørt, at býta íløgurnar í tveir partar. Har tvær vakstrarfremjandi íløgur, Byggibúning bústaðir (útstykkingin á Fossum v.m.) og ídnaðarøkið undir Hamri, skuldi fíggjast við einum kreditti frá Norðya Sparikassa. Hetta var gjørt, tí báðar hesar verkætlanir hava eina útreiðslu, men eisini eina beinleiðis inntøku av sølu av grundstykkjum.

Mett verður, at fleiri stykkir kunnu seljast í samband við vinnuøkið á Borðoyavík, longu í inniverandi ári. Hóast ikki kann roknast við nakrari sølu av grundstykkjum á Fossum í ár, so verða væntandi nøkur privat stykkir seld, eitt nú Millum Hjalla. Higartil í ár eru 2 stykkir seld Millum Hjalla, og eisini eru stykkir seld á Norðoyri. Í løtuni eru eisini tveir ítøkiligir fyrispurningar um at keypa grundstykkir Millum Hjalla.

Mynd av fíggjarætlan og tillagingum:

Klaksvíkar kommuna	Roknsk.	F.ætlan		F.ætlan
Tillagingar 2020	2019	2020	Tillagingar	2020
Inntøkur	-288.432	-295.000		-295.000
Rakstur	202.913	207.600		207.600
Rakstrarúrslit	-85.519	-87.400		-87.400
Rentustuðul	3.675	3.600		3.600
	-81.844	-83.800		-83.800
Rentur	3.076	3.400		3.400
Úrslit	**-78.768**	**-80.400**		**-80.400**
Íløgur	106.292	76.400	36.095	112.495
Úrslit eftir íløgur	**27.524**	**-4.000**		**32.095**
Avdráttir	**0**	**-4.000**		4.000
Úrslit eftir avdráttir	**27.524**	**0**		**36.095**

Á talvui niðanfyri er útgreinað gongdin í likviditetinum:

Tillagingar 2020	1.000 kr
Íløgur við tillagingum	**86.995**
Tøkur peningur áðrenn kreditt	**-97.400**
Tøkur peningur eftir tillagingar	**-10.405**
Vakstrarfremjandi íløgur	**25.500**
Kredittur NSPK	**-40.000**
Eftir av kreditt	**-14.500**
Íløgur tilsamans	**112.495**
Tøkur peningur v/kreditt	**-137.400**
Tøkur peningur v/kreditt	**-24.905**

Fíggjarætlan 2020 vísir eitt rakstraravlop á 80,4 mió. kr. og tøkur peningur 21,0 mió.kr. Tøkur peningur verður tí 101,4 mió.kr. Samtyktu avdráttirnir eru 4,0 mió.kr. Tøkur peningur verður eftir avdráttir 97,4 mió.kr. íroknað kassakreditt á 40 mió. kr verður samlaði tøki peningurin 137,4 mió.kr.

Við teimum tillagingum, ið eru í hesum uppskotinum, verða tað við ársenda 10,4 mió. kr. á bók hjá kommununi og 14,5 mió. kr. tøkur at trekkja av kredittinum.

Tað vil siga, at í alt verður tøka gjaldførið við ársenda 24,9 mió. kr.

Niðanfyri sæst talva yvir tær tillagingar, ið býráðið verður at umrøða og taka støðu til:

Raðfestingar 2020	F.ætlan 2020	Tillagingar	Íløgur 2020	Her av 2021
Skúlin á Skúlatrøð	3.000	14.694	17.694	
Spillivatn	2.000	0	2.000	
Bláa Skýlið	6.000	2.341	8.341	
Fastogn	2.500	0	2.500	0
Vegir	6.000	0	6.000	0
Miðbýur	8.000	0	8.000	
Rennibreyt	2.700	3.000	5.700	
Hallirnar	500	0	500	
Havna- og vinnuøkið	10.000	858	10.858	
Brandbilur (Stigabilur)	3.000	0	0	3.000
Barnagarður	5.000	0	2.500	2.500
Fimleikarhøll	3.000	0	2.000	1.000
Spæliland	5.000	0	2.000	3.000
Kapprórðarneyst	7.000	0	3.000	4.000
Spælipláss	1.500	2.702	4.202	
Kirkjugarður	500	0	500	
Vatnveiting	0	3.500	3.500	0
Eldraøkið	0	3.800	2.000	1.800
Íløgur tilsamans	**65.700**	**30.895**	**81.295**	**15.300**
Íløgustuðul				
Húsarhaldsskúlin	2.000	0	2.000	
Mentanarhúsið	8.000	0	3.000	5.000
Nólsoyar Páls Húsið	200	0	200	
Fakstorshúsini	500	0	500	
Íløgustuðul tilsamans	**10.700**	**0**	**5.700**	**5.000**
Íløgur/íløgustuðul tilsamans	**76.400**	**30.895**	**86.995**	**20.300**
Tøkur peningur			**-97.400**	
Tøkur peningur eftir tillagingar			**-10.405**	
			2020	
Játtaður kredittur			**-40.000**	
Vakstrarfremjandi íløgur				
Ídnaðarøkið undir Hamri	10.000		10.000	0
Byggibúning bústaðir (Útstykking á Fossum v.m.)	15.500		15.500	0
Vakstrarfremjandi íløgur tilsamans	**25.500**	**0,0**	**25.500**	
Íløgur tilsamans	**101.900**	**30.895**	**112.495**	20.300

Lógargrundarlag:
Kommunulógin við meira.

Fíggjarligar avleiðingar:
Víst verður til omanfyri nevndu lýsing av fíggjarligu avleiðingum, í samband við tillagingar av fíggjarætlanini fyri 2020.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevnd og býráð umrøða og taka støðu til uppskotið.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Lógargrundarlag:
Kommunulógin við meira.

Fíggjarligar avleiðingar:
Víst verður til omanfyri nevndu lýsing av fíggjarligu avleiðingum, í samband við tillagingar av fíggjarætlanini fyri 2020.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevnd og býráð umrøða og taka støðu til uppskotið.

Fíggjarnevndin 26. mai 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 22-05-2020.

Klaksvíkar Býráð 28. maj 2020:
Tilmælið frá FíN 26-05-2020 einmælt samtykt.